Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Móttøka við nýggjum eigarum á Hotel Eiði

**Mánadagin 15. mai var móttøka á Hotel Eiði, í sambandi við at hotellið hevur fingið nýggjar eigarar. Hotellið letur upp alment ein av fyrstu døgunum**

MÓTTØKA
*Myndir: Finnur Rubeksen*

Hotel Eiði hevur fingið nýggjar eigarar. Tað eru tey fimm: Malan Rubeksen, Herjón Olsen, Jóhan K. Joensen, Tummas Súni Joensen og Anfinn Kruse á Eiði, sum hava keypt hotellið. Malan Rubeksen er úr Havn, meðan hinir fýra eru av Eiði.

Nógv fólk vóru møtt til móttøkuna mánadagin 15. mai, bæði eiðisfólk, fólk sum arbeiða í ferðavinnuni og kommunu- og landsmyndugleikar.

Móttøkan byrjaði við at ein av eigarunum, Malan Rubeksen, beyð øllum at vera vælkomin, síðan vórðu røður hildnar av Tordi Niclasen, borgarstjóra (í farloyvi) á Eiði, Bjarna Djurholm, landsstýrismanni, og Johan Restorff, fyrrverandi hotelleigara.

Ein av eigarunum, stjórin Herjón Olsen, sigur, at hotellið letur upp alment ein av fyrstu døgunum. Í løtuni verða tær seinastu fyrireikingarnar gjørdar.

Hotellið skal verða fyri øll. Miðað verður ímóti at tey rørslutarnaðu skulu hava eins góðar møguleikar og øll onnur at koma runt í húsinum.

Málið er at brúka hotellið til nógv ymisk tiltøk og at skipa fyri nógvum ymiskum sum t.d. føroyskum kvøldum, har einans føroyskur matur er á skránni, og øðrum líknandi tiltøkum.

Annars verður hotellið opið frá tíðliga á morgni við mogunmati, síðan verða kaffi og køkur at fáa allan dagin. Á middegi verður døgurði, og um kvøldið verður heitur matur fáa sum t.d. búffar, steikir og fiskarættir til umleið kl. 22.

Hotel Eiði varð bygt í 1983 av Hans Petur Poulsen, sum rak hotellið í nógv ár.

Hotellið, sum er í trimum hæddum, hevur 12 dupultog 4 einkultrúm.

Harumframt er eisini fundarrúm til umleið 40 fólk. Í matstovuni rúmast vanliga 80 fólk, meðan tað ber til at dekka til 120 fólk til veitslur o.a.

Hotellið liggur væl fyri við góðum útsýni yvir bygdina og suður gjøgnum Sundalagið.

Í løtuni verður arbeitt við at gera faldarar og heimasíðu, har fólk kunnu síggja hvat vit hava at bjóða, sigur Herjón Olsen, stjóri á Hotel Eiði.



*Nýggju eigararnir av Hotel Eiði, f.v.: Herjón Olsen, Malan Rubeksen, Jóhan K. Joensen, Tummas Súni Joensen og Anfinnur Kruse*



*Malan Rubeksen og Eirik Suni Danielsen frá grannahotellinum, Gjáargarði við Gjógv*



*Jógvan K. Mørkøre, fyrrverandi bygdaráðsformaður á Eiði, og Finn Ougaard varafúti*



*Herjón Olsen, stjóri á Hotel Eiði og Odd Bjellevåg*



*F.v.: Sombath Roddum, Birgir Carlsson og Armgar Steinhólm*



*Tordur Niclasen, borgarstjóri á Eiði, sum í løtuni er í farloyvi, bjóðar nýggju eigarunum vælkomnum*



*F.v.: Malan Rubeksen, Johan Restorff og Birna Gaard*



*Finnur Rubeksen úr Havn og dótturin Malan Rubeksen, sum er ein av eigarunum av hotellinum*



*Nógv fólk og góður matur*